**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **12/00179**<br>**Umsókn um stuðul til seinasta bind av Lervíkar søgu**<br>Trivnaðarnevndin mælir til at beina málið í fíggjarnevndini, av tí at játtanin til stuðul sum trivnaðarnevndin hevur at ráða yvir er brúkt. | Málið útsett. |
| 2. | **10/00509**<br>**Umsókn um at brúka ovaru hædd á Valhøll til tónleikamiðstøð**<br>Ætlanin um at brúka ovaru hædd á Valhøll til venjingarhølir er nú slept. Nú er umsókn komin frá Tónleikamiðstøðini um at fáa loyvi til at brúka hølini til umsiting og annað virksemi ístaðin.<br><br>Meirlutin í trivnaðarnevndini Hanna Jensen og Páll Isholm mæla til at ganga umsóknini á møti, minnilutin Tollakur Joensen atkvøður blankt | Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti. Treyta av at leigisáttmáli verður gjørdur, sum skal góðkennast av býráðnum. |
| 3. | **12/00183**<br>**Keyp av lendi til transformarastøð í Leirvík matr. nr. 351**<br>SEV hevur sent umsókn um byggiloyvi til transformarastøði á Hagaleiti, sum teir hava fingið byggiloyvi til at byggja.<br><br>Sambært viðtøkunum fyri SEV §10, stk. 1 um skyldur hjá kommununi í sambandi við bygging av transformarastøðum, er vanlig mannagongd, at kommunan eigur lendi til transformarastøðirnar, og at SEV fær ókeypis nýtslurætt.<br><br>Lendið er umleið 200 $m^2$ og er kostnaðurin uml. kr. 30.000,00 kr. íroknað tinglýsing.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at lendið verður keypt, og at peningurin verður tikin av konto 6.22.11.510 (byggibúning)<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

| | | |
|---|---|---|
| **4.** | **12/00194**<br>**Viðtøkur fyri sjálveigandi grunnin (Bátasavnið)**<br>Uppskot til viðtøkur fyriliggur.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til viðtøkur, og at umboðini í nevndini fyri kommununa verða Fríðgerð Heinesen, Erik Lervig og Páll Isholm. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini. |
| **5.** | **12/00191**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til nýggjan graslíkisvøll**<br>Á býráðsfundi tann 10. mei 2012 bleiv samtykt at veita eykajáttan á 1,1 mió. kr., og at peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð | Samtykt eins og við 1. viðgerð.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Fríðgerð Heinesen<br>Terji Lervig<br>Jan E. Petersen<br>Páll Isholm<br>Tollakur Joensen<br>Hanna Jensen<br><br>**Atkvøður ímóti:**<br>Steintór Jacobsen, við tí viðmerking at íløgan eigur at verða fíggjað við verandi játtan til ítróttarøkið. |
| **6.** | **12/00149**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til Barnavernd**<br>Á býráðsfundi tann 30. apríl 2012 bleiv samtykt at veita eykajáttan á 270 t.kr, og at peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð. |
| **7.** | **12/00174**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til konto 6.30.41.511 (Kloakkir)**<br>Á býráðsfundi tann 30. apríl 2012 bleiv samtykt at veita eykajáttan á 1,3 mió. kr., og at peningurin verður tikin av innistandandi. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

Í fíggjarætalnini fyri 2011 bleiv samtykt at nýta 2,6 mió. kr til kloakkir, harav 900 t.kr. varð eykajáttan, av hesum bleiv bert 1,7 mió. kr. brúkt. Grundin til at játtanin í fjør ikki bleiv brúkt var at ætlanin var at leggja nýggjar kloakkir eftir fjørini úti í bug í Leirvík, og bleiv sáttmáli eisini gjørdur um hetta arbeiði við RTS/JHR. Arbeiði bleiv tó ikki gjørt liðugt/nøktandi í fjør og er er nústani liðugt, tískil verður neyðugt at hækka eykajáttanina frá 1,3 mió. kr. til 2,2 mió. kr.

Fíggjarnevndin mælir til at hækkað eykajáttanina til kr. 2,2 mió. kr.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Hans Mourits Foldbo
Fríðgerð Heinesen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Steintór Jacobsen
Tollakur Joensen
Hanna Jensen

**Atkvøddi blankt:**
Páll Isholm

**8. 12/00201**
**Skrivstovuhølir til umsitingina og býráðið**
Fíggjarnevndin mælir til at umsitingin og býráðið flytir inn í hølini sum kommunan hevur keypt frá Sjóborg í Leirvík eftir summarfrítíðina.

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**9. 12/00193**
**Roknskapur fyri 2011**
Góðkenning av roknskapi fyri 2011.

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Steintór Jacobsen ______________________________

Jan E. Petersen ______________________________

**Býráðsfundur mánadagin 29. mei 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

Páll Isholm ____________________________________________________

Hans Mourits Foldbo ____________________________________________________